# REGLUGERÐ

## fyri kirkjugarðarnar
## í Vestmanna

2025

# A. Umsiting

## § 1

Kirkjugarðarnir eru ogn hjá Vestmanna Kommunu. Umsjónarmaðurin hevur umsjón við kirkjugørðunum.

## § 2

Starvið sum gravari er lagt undir starv umsjónarmansins hjá Vestmanna kommunu. Tá ið grøv verður grivin, er tað ábyrgd umsjónarmansins, at alt arbeiðið í kirkjugørðunum í samband við jarðarferðina verður gjørt til lítar. Tekniska nevnd hevur eftirlit við hesum arbeiði.

# B. Kirkjugarðsbókin og kirkjugarðskortið

## § 3

Kommunuskrivstovan hevur eina kirkjugarðsbók og eitt kirkjugarðskort undir hond og í varðveitslu.

Í kirkjugarðsbókina verður skrivað talið á merkissteyranum, fult navn, bygd/býur, føðingardagur og –ár, andlát, jarðarferðardagur, viðmerking.

Vestmanna kommuna eigur kirkjugarðsbókina og kirkjugarðskortið.

# C. Um gravir

## § 4

Tá ið jarðarferð skal verða, ella urna skal verða gravsett, vendir avvarðandi sær til Vestmanna kommunu.

Flestu nýggju gravstøð verða grivin í kirkjugarðinum á Knúgvum. Einans tey, sum frammanundan hava maka gravsettan í kirkjugarðinum við kirkjuna, kunnu gravsetast har.

Urnur kunnu gravsetast í báðum kirkjugørðunum. Kommunuskrivstovan ávísir gravstað.

Jarðarferðin eigur at enda so, at gravarin kann gera gravstaðið liðugt, áðrenn dagur fer at halla.

## § 5

Friðingarskeiðið (tey árini, ein grøv skal vera órørd frá tí, at jarðað er) er fyri vaksnamannagrøv 30 ár og fyri barnagrøv (til 12 árs aldurin) 20 ár.

## § 6

1. Ein vaksnamannagrøv skal vera minst 2,5 x 1,2 m, og hon skal vera minst 1,75 m djúp, so at tað í minsta lagi er 1,0 m av mold oman á kistulokinum. Støddin á barnagrøv kann vera minni – sum kistustøddin er.

   Somuleiðis kann eisini støddin á grøv til urnu vera minni, ella urnan kann verða gravsett niður á kistulokið hjá einum avvarandi.

2. Deyðfødd og lík av nýføðingum kunnu verða jarðað, har jarðað er fyrr, tá ið umstøður eru og Vestmanna Kommuna samtykkir.

# D. Jarðað í somu grøv

## § 7

1. Við gildið frá 1. mars 2025 verður longst livandi jarðað/ur í somu grøv sum makin.

2. Um onnur ynskja at verða jarðaði í somu grøv, seta viðkomandi seg í samband við Vestmanna Kommunu.

3. Har lendið forðar fyri tí, er ikki møguligt at jarðað í somu grøv.

4. Hetta er ikki galdandi fyri tey sum hava ognað sær festibræv áðrenn 1. mars 2025. Festibrævið kann ikki latast øðrum.

# E. Gravarumsiting

## § 8

1. Avvarðandi hava skyldu til at røkja leiðið (leiðini) væl, eisini gravsteinar o.l. Verða onnur sett til at halda leiðið (leiðini), hava avvarðandi skyldu til at ansa eftir, at reglurnar fyri kirkjugarðin verða hildnar.

2. Ikki er loyvt at planta høgan vøkstur, heldur ikki trø ella trævøkstur, sum kunnu breiða seg út yvir onnur leiði.

3. Merkissteyrar á leiðunum skulu ikki verða fluttir, uttan at Vestmanna Kommuna loyvir tí.

4. Við hvørt leiði er loyvt at seta gravstein. Kommunan setur av til gravstein.
   Uttan um leiðið er ikki loyvt at seta kantsteinar ella tílíkt. Grøvin skal sum frálíður slættast. Frammanfyri gravsteinin kann eitt øki upp á 50 x 50 cm nýtast til plantur, blómur ella annað prýði.

5. Um gravsteinar ella planting á leiðinum ikki verða umsitin, men misrøktin skemmir, og um avvarðandi ikki heldur hesar reglur og ikki fer sømuliga fram í kirkjugarðinum, kann tekniska nevnd mæla til at lata rudda av leiðinum og taka burtur gravstein. Avvarðandi skal fyrst fáa boð um at røkja leiðið, um tekniska nevnd veit bústað hansara. Endalig avgerð um at taka burtur gravstein og rudda leiðið liggur tó hjá Vestmanna Bygdarráði.

6. Tekur Tekniska nevnd sær av einum leiði, sum nevnt í hesi grein, stk. 5, so eigur kirkjugarðurin gravsteinin og annað á leiðinum og hevur ræði á tí. Ein møgulig longd friðing fellur í sama viðfangi burtur.

## F. Gravsteinar

## § 9

Vestmanna kommuna hevur onga ábyrgd av gravsteinum.

Er kommunan í iva, um ein gravsteinur er hóskandi, eigur spurningurin at verða lagdur fyri Føroya Kirkjustjórn.

Kirkjustjórnin kann krevja eitt óhóskandi gravsteinstekin tikið burtur.

## G. Kirkjugarðsfriður

## § 10

1. Kirkjugarðarnir eru vígdir friðstaðir, sum eingin má órógva.

2. Tað eigur bara at verða gingið á kirkjugarðsgøtunum og har, ið ikki jarðað er, um hetta er gjørligt.

3. Smábørn eiga ikki at vera í kirkjugarðinum uttan saman við vaksnum, sum hava ábyrgdina av teimum. Børn mugu ikki spæla í kirkjugarðinum.

4. Fólk, sum koma í kirkjugarðin, skulu lata kirkjugarðsportrið væl aftur eftir sær.

5. Hundar skulu ikki koma í kirkjugarðin og fenaður heldur ikki.

6. Einans akfør hjá kommununi ella onnur, sum hava fingið loyvi frá Vestmanna kommunu, kunnu í serligum førum koyra í kirkjugarðinum.

7. Óviðkomandi mugu ikki røra nakað ella flyta nakað av gravum, og eingin má gera seg inn á gravsteinar.

8. Um fólk brúka amboð hjá kirkjugarðinum at arbeiða við á leiði, so skulu amboðini verða løgd aftur har, sum tey eiga at liggja.

9. Gamlir kransar og annað, sum ein ruddar av einari grøv, skal verða lagt á eitt ávíst stað, har alt órudd í kirkjugarðinum skal leggjast, og skal tílíkt órudd ikki verða borið úr kirkjugarðinum.

## H. Kærur

## § 11

Kæra um avgerð, sum tekniska nevnd hevur tikið, kann leggjast fyri Vestmanna bygdarráð.

## I. Broytingar í reglugerðini

## § 12

Tá ið tekniska nevnd heldur tað vera neyðugt, eigur hon at leggja fyri bygdarráðið broytingaruppskot í hesari reglugerð.

Bygdarráðið kann altíð broyta reglugerðina, tá ið ráðið heldur tað vera neyðugt. Kirkjuráðið fyri Vestmanna kirkju skal tó fyrst lata sítt ummæli.

Vestmanna bygdarráð
Tann 26. februar 2025